www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 12 - 2011

# Savna fiski- og oljuvinnu

Í Norra eru tey farin undir eitt nýtt stig til tess at savna tvær ta mest týðandi vinnurnar, fiski- og oljuvinnuna. Umboð fyri sjómatsvinnuna og oljuvinnuna eru samd um at skipa fyri einum forum á toppleiðarastigi, nevnt Eitt hav. Hetta skal hjálpa til at minka um trupulleikar og stríð millum vinnurnar og eisini skapa eina økta virðisøking fyri báðar vinnurnar. Hetta skrivar OLF, Oljeindustriens Landsforening, ið er systurfelag til tað føroyska FOIB, Føroya Oljuídnaðarbólkur á heimasíðu síni. Eitt hav er eitt forum ella stað, har oddafólk í norsku sjómatarvinnuni og oljuvinnuni skulu hittast javnan til at umrøða felags áhugamál og viðurskifti. Hetta forum skal umsitast av eini nevnd við umboðum fyri Norges Fiskarlag og Oljeindustriens Landsforening, sum umboðar bæði oljufeløg og oljuídnaðin í Norra. Á odda fyri hesum nýggja forum verður Leiv Grønnevet, ið hevur dúgvar royndir sum vinnulívsmaður og hevur góðan kunnleika til báðar vinnurnar. Virksemi í Eitt hav skal fíggjast av báðum vinnunum skrivar heimasíðan OLF.no. Luttakarar í hesum toppleiðaraforummi koma frá Norges Fiskarlag, Fiskeri- og havbruksnæringens landsforening, Fiskebåtredernes Forbund, LO-sekretariatet, IndustriEnergi, Oljeindustriens Landsforening og onnur feløg i fiskivinnuni. Fyrsti fundurin í nýggja forumminum verður í februar.